Fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundinum 2. febr.

Møtt vóru: Durita Poulsen,Rakul Borg Brattaberg, Birgir Jørgensen, Jonleyg Eyðunsson, Marin H. Gaardlykke, Hjørdis Simonsen og John Henrik Holm var við umvegis Teams.

Skrá: Umrøðu av ynskinum hjá Vágs Býráð at seta á stovn forskúla í Vágs Skúla

Sum tilfar til fundin var ein fundarfrásøgn frá einum fundi á kommunuskrivstovuni tann 27.01.2022 - sí niðanfyri standandi

***Fundur á kommunuskrivstovuni 27-01-2022:***

*Møtt:*
*Bjarni Johannsen og Petry H. Mortensen*
*John Henrik Holm og Anita Ryggshamar, Vágs skúla*
*Anna Maria E. Jakobsen, dagstovnaleiðari*

*Til umrøðu var hvørt Vágs kommuna fyri skúlaárið 2022/2023 skal søkja um, at seta á stovn forskúla í Vágs skúla.*

*Allir partar vóru samdur um, at hetta var eitt gott hugskot, umrøtt vóru skipanir til loysn og starvsfólkaviðurskifti.*
*Semja var um, at hetta bara er ein lítil broyting fyri skipanina, og at søkjast skal innanhýsis eftir teimum starvsfólkunum sum skulu starvast í forskúlanum. Normering av starvsfólkið verður tann sama sum hon er í dag, møguliga eitt vet betur.*

*Avgjørt var at Anna Maria og John Henrik fáa uppá pláss normeringina, John Henrik tekur málið upp í skúlastýrinum og Anna Maria tekur málið upp við tey sum í dag starvast á økinum.*
*Eisini var umrøtt at hetta broyttir uppá tørvin til karmarnar fyri frítíðarskúla, við hesi broyting økist talið av børnum sum skulu í frítíðarskúla upp ímóti 50 børnum og tí má hugsast um, at frítíðarskúlin fær aðrar karmar at virka undir.*

*Niðurstøðan var at John Henrik og Anna Maria gera eitt skriv klárt sum verður lagt fyri Mentamálanevndina á fundi 15. februar og býráðsfund 28. februar.*

*Hereftir verður umsókn send Landsstýrismanninum um loyvið at seta á stovn forskúlaflokk í Vágs skúla frá skúlaárinum 2022/2023.*
*Notera: Petry Harginsdóttir Mortensen*

---

Skúlastýrið tjakaðist nógv og leingi um ætlanina um at seta á stovn forskúla til komandi skúlaár. Eingin niðurstøða var gjørd á fundinum. Semja var um, at skúlatýrið vantaði upplýsingar um í

hvønn mun ætlaða broytingin ávirkaði innihaldið í einum komandi forskúla. Umframt at man ynskti nærri kunning um

- Hvat er endamálið við forskúla, hví?
- Normering?
- Fíggarjáttan?
- Staðseting?

Skúlastýrið hevur ætlan um at vitjar aðrir forskúlar og viðgera málið á komandi fundi.

D. Poulsen

Durita Poulsen

R Borg Brattaberg

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Jónleyg Eyðunsson

Marin H. Gaardlykke

Hjørdis R. Simonsen